# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Elin og Høgni Poulsen gullbrúdleyp



Leygardagin 30. juli vóru tað 50 ár síðani, at Elin og Høgni Poulsen giftust. Stóra dagin hildu tey hjá dóttrini og versoninum í Miðvági. Tey vóru í mong ár prestahjún í Vágum og seinni í høvuðsstaðnum.

Elin, sum er 74 ára gomul, er ættað av Tvøroyri. Foreldrini hjá henni vóru Inga, fødd Nielsen, og Magnus Magnussen.

Høgni, sum er 75 ára gamalur, er ættaður úr Sandvík. Foreldrini hjá honum vóru Johanna, fødd Poulsen, og Dánjal Poulsen.

Tey bæði hittust, tá ið tey undir krígnum gingu í realskúla á Tvøroyri. Tey giftust í Danmark, har tey vóru undir útbúgving, og tey komu aftur til Føroya í desember í 1957.

Elin lærdi til sjúkrasystir á Bispebjerg Hospitali í Keypmannahavn. Hon arbeiddi sum sjúkrasystir í Danmark, og nakað eftir, at familjan var flutt vestur í Vágar, fór Elin at nýta útbúgingina, umframt at hon var prestakona. Hon arbeiddi á Ellisheiminum í Vágum frá tí, at tað varð tikið í nýtslu í 1972, og seinni var hon á røntgendeildini á Landssjúkrahúsinum.

Høgni leyk gamalt ella klassiskt málsligt studentsprógv í Rønde í 1951. Hann las síðani gudfrøði á lærda háskúlanum í Keypmannahavn, har hann var liðugur í 1957.

Fyrsta prestastarvið hjá Høgna var í Suðurstreymoyar prestagjaldi, har hann varð innsettur í embætið fjórða sunnudag í advent í 1957. Frá 1963 og fram til í 1976 var hann prestur í Vága prestagjaldi, sum umframt bygdirnar í Vágum fevndi um Mykines. Í 1976 fluttu tey bæði til Havnar, har Høgni hevði fingið starv í vestara prestagjaldinum, og í Vesturkirkjuni og hinum kirkjunum í sóknini starvaðist Høgni Poulsen, inntil hann legði frá sær.

Høgni hevur verið ógvuliga virkin í kirkjuliga umhvørvinum. Í lestrartíðini vóru tey bæði í Ungmannafelagnum, har nógvir føroyingar savnaðust, og har Elin og Høgni vunnu sær nógvar vinir. Tað var Emil Joensen, prestur, sum var ættaður úr Bø, og sum var prestur í Mariekirken í Keypmannahavn, sum upprunaliga fekk ungmannafelagið í lag.

Høgni var limur í Samfundsráðnum ella Høvuðsstýrinum, sum tað nú nevnist, fyri Heimamissiónini í Føroyum í nógv ár. Hann var við til at stovna Heimamissiónsforlagið, og hann hevur verið í stýrinum fyri og eitt skifti formaður í stýrinum fyri Meiningheitshúsið í Havnini. Hann hevur eisini verið formaður í nevndunum fyri KFUM og Bláa Kross.

Tá ið ellisheimið í Vágum, sum var tað fyrsta av sínum slagi í landinum, varð bygt, var Høgni Poulsen formaður í bygginevndini. Grundarsteinurin varð lagdur av Ingrid drotning í 1969, og heimið varð tikið í nýtslu í 1972.

Elin og Høgni Poulsen eiga tríggjar døtrar: Jóhanna, sum er sjúkrasystir, er gift Jákupi Reinert Hansen, presti. Tey búgva á Sandi. Inga, sum er prestur, er gift Mariusi Dam, kommunulækna og løgtingsmanni. Tey búgva í Miðvági. Durita, ið er lækni, er gift Claus Weber, eksport teknikkara. Tey búgva í Odense. Elin og Høgni Poulsen eiga 11 barnabørn.

Húsarhaldsskúlanæmingar:

## Hittust aftur 50 ár seinni



Í 1955 vóru 17 føroyskar gentur á húsarhaldsskúla í Haslev. 4. juni 2005 – 50 ár seinni – hittust 10 av teimum aftur hjá Sólgerð á Røgvi Olsen á Argjum. 3 eru ikki á lívi í dag, og hjá hinum 4 barst frá at koma.

Á myndini eru f.v.: Ása Midjord, Fuglafjørður, Rigmor Toftegaard, Fuglafjørður, Judith Olsen, Fuglafjørður, Ebba Joensen, Gjógv, Sonja Hansen, Tórshavn, Katrin Haraldsen, Fuglafjørður, Hanna Johannesen, Søldarfjørður, Sólgerð á Røgvi Olsen, Argir, Mona Simonsen, Sandavágur, og Lis Djurhuus, Sandur

## Andlát og jarðarferðir

Mánadagin 1. august andaðist Johan Christiansen í Pokeri, vanliga nevndur Hanniba hjá Kristiani, 93 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum fríggjakvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður leygardagin klokkan 13:30 úr Porkeris kirkju. Sungið verður úr sálmabókini.

Tey, ið vilja minnast Hanniba, kunnu lata Missiónshúsinum í Porkeri eina peningagávu.

Tummas Vilhelm, Klaksvík, andaðist á Norðoya Røktarheimi 3. august, 91 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsið fríggjadagin 5. august klokkan 18:00. Jarðarferðin verður úr Betesda leygardagin klokkan 13:30.

Óli Hammer, úr Fámjin, andaðist mikudagin 3. august á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi, 81 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi leygardagin klokkan 16:00. Jarðarferðin verður úr Fámjins kirkju sunnudagin klokkan 13:00.

*Kelda: Útvarpið*

## 75 ára føðingardagur

Í sambandi við at Eiler Jacobsen, Marknagilsvegur 19, Havn, fylti 75 ár 30. juli, verður føðingardagsveitsla hildin á Hotel Føroyum fríggjakvøldið 12. august kl. 19.

Av tí at Eiler EINKI VEIT um veitsluna og er burturstaddur í løtuni, verða tey, ið vilja gleða Eiler við at koma, vinarliga biðin um at ringja: 314605, 721612 ella 223765 í seinasta lagi 7. august.

## Dagurin

**5. august. Ásvaldur**, deyður í 642. Enskur kongur, sum var sera ágrýtin í trúboðaravirki í landi sínum. Millum annað bygdi hann á oynni við landnyrðingsstrond Onglands kleystrið Lindisfarne, ið víkingar løgdu í oyði í árinum 793. Ásvaldur fell í einum bardaga við heidna kongin Mercia.

Navnið er gamalt enskt, ið merkir *Guð ræður.*



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost:
**post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til:
**Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst